UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 15. juni 2022
J.nr.: 22/10228-1
At tilskila í svari
Viðgjørt: jd

# Reglugerð um stuðul til gransking í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum

Granskingarráðið kann, við heimild í § 21, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn, lata stuðul til gransking og líknandi kanningar í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum eftir ásetingunum í hesi reglugerð.

*Virksiøkið*
Stuðul eftir hesi reglugerð kann verða latin verkætlan, sum viðger viðurskifti á bæði almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Stuðul kann latast bæði til smærri verkætlanir og kanningar og til størri verkætlanir, t.d. ph.d.-verkætlanir.

Yvirskipað skulu verkætlanir, sum fáa stuðul, gagna arbeiðsmarknaðinum frameftir.

Talan kann vera um kanning ella gransking, ið kann fevna um allan arbeiðsmarknaðin, eins og talan kann vera um gransking í viðurskiftum, sum hava serligan týdning fyri starvsfólk í ávísari vinnu ella á ávísum starvsøki.

Virkisøkið er ikki avmarkað, men tað er ein treyt, at talan er um gransking í viðurskiftum, sum eru viðkomandi fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, ella gransking í øðrum arbeiðsmarknaðarviðurskiftum, sum tørvur er á at fáa lýst.

Stuðulsskipanin skal virka fyri, at granskingarførleikin mennist, eitt nú við at stuðla ph.d. lestri og øðrum vísindaligum útbúgvingum eftir kandidatstig. Í eini kanningarverkætlan skal granskingarførleikin mennast við at granskari virkar sum fakligur vegleiðari hjá tí, sum fremur verkætlanina.

Stuðul til gransking kann verða játtaður, tá ið granskingin verður:
1) framd av føroyskum granskara ella
2) framd í samstarvi við føroyskan granskingarstovn ella
3) mett at hava samfelagsligan týdning fyri Føroyar.

Úrslitini frá stuðlaðum verkætlanum skulu almannakunngerast.

*Nevnd*
Stuðulsskipanin verður stjórnað av teirri faknevnd, sum landsstýrismaðurin í granskingarmálum setur við heimild í kunngerð um stuðul til gransking.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN • TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

Í viðgerð og støðutakan til umsóknir skal nevndin áseta minstamark fyri stuðli til verkætlanir og minstamark fyri, hvussu nógv má verða fíggjað av øðrum enn stuðulsskipanini.

*Raðfestingar*
Faknevndin skal tryggja, at samlaði stuðulin verður hóskandi býttur millum raðfest øki innan gransking í arbeiðsmarknaðarviðurskiftum.

*Kunning*
Faknevndin kunnar almenningin um møguleikan at søkja um stuðul úr skipanini og skal seta eina freist at lata inn umsóknir. Nevndin kunnger til hvørji granskingarøki, stuðul verður veittur, sbr. omanfyri.

Faknevndin hevur eftirlit við, at stuðulin verður nýttur til ætlað endamál.

Frágreiðing um játtaðan stuðul verður send landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum eina ferð um árið. Samlað frágreiðing um allan latnan stuðul verður latin landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum, tá ið samlaða stuðulsjáttanin upp á 10 mió. kr. er brúkt.

*Umsóknir*
Umsóknir um stuðul úr stuðulsskipanini skulu nágreiniliga lýsa ta verkætlan, sum stuðul verður søktur til. Eisini skulu umsóknirnar gjølla lýsa fakliga og vísindaliga førleika umsøkjarans. Umsøkjari skal skjalprógva sín fakliga førleika, fíggjartørv og aðrar viðkomandi upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina í nevndini. Kravdar upplýsingar skulu latast umvegis umsóknarskipan stovnsins.

*Meting*
Umsókn um stuðul til gransking verður send til metingar hjá óheftum metarum við serkunnleika innan viðkomandi granskingarøki, tá ið stuðulsupphædd og vavið á verkætlanini talar fyri tí. Viðkomandi metarar gera ummæli til nevndina, um tað granskingarliga innihaldið í umsóknini er í lagi. Í øllum øðrum førum er tað faknevndin, sum tekur støðu.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 15. juni 2022

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen